## Owen bjargaði Keegan

Trýstið er stórt á Newcastle-venjaranum Kevin Keegan. Og í gjárkvøldið stóð heilt nógv á. Í útidystinum móti Birmingham, sum eisini er í niðuflytingarvanda, var Newcastle aftan fyri 1-0. Stutt eftir steðgin javnaði Michael Owen tó fyri Newcastle, og restina av dystinum áttu gestirnir. Fleiri mál komu tó ikki, men avrikið seinasta hálva tíman gevur vón fyri betri úrtøku, tá Newcastle um vikuskiftið spælir heimadyst móti Fulham.



## Rógvi skal venja Neistan

Dimmalætting skrivar í gjár, at Svein Rógvi Nielsen verður nýggur venjari hjá Neista-kvinnum. Rógvi, sum júst er fyltur 34 ár, hevur seinasta árið verið venjari í Fredericia í Danmark. Og eisini her í Føroyum hevur hann drúgvar royndir sum venjari. Eitt nú hevur hann vant kvinnurnar hjá Stjørnuni og Kyndli, umframt at hann tvær ferðir hevur leitt kvinnulandsliðið í Challenge-Trophy kappingini.

# Torkil og Helgi stavn um stavn

**Veteranurin úr Sandavági hevur staðið seg so mikið væl, at hann nú er á odda saman við favorittinum Helga Dam Ziska**

TALV
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í dag klokkan tvey verður farið undir fimta umfar í FM kappingini í talvi fyri einstaklingar, sum í hesum døgum er í Eysturskúlanum í Havn. Harvið er kappingin um at vera hálvrunnin, tí tað eru níggju umfør íalt.

Mest merkisverda avrikið higartil hevur Torkil Nielsen staðið fyri. Hann hevur vunnið tvey talv og tvær ferðir verið partur av remis. Úrtøkan ber við sær, at Torkil undan 5. umfari er á odda saman við favorittinum Helga Dam Ziska.

Í gjár vóru tvey umfør telvað. Í 3. umfari vann Torkil góðan sigur, tá ið hann við svørtum fekk fult ímóti Carl Eli Nolsøe Samuelsen. Helgi Dam Ziska fekk eisini fult við svørtum. Hann vann á Finnbirni Vang.

Í 4. umfari endaði tað remis millum Torkil Nielsen og Rana Nolsøe, sum harvið vann sítt fyrsta hálva stig. Helgi Dam Ziska og Hans Kristian Simonsen telvaðu eisini remis. Í seinna umfarinum í gjár endaðu trý av fimm talvum remis. Eftir vónbrotið ímóti Torkili fyrrapartin styrkti Carl Eli aftur um sína støðu, tá ið hann vann á Herlufi Hansen.

Ólavur Simonsen, sum fyrrapartin við hvítum hevði taðt ímóti Olafi Berg, vann seinnapartin á Martini Poulsen. Gjárdagurin royndist illa hjá Martini. Úrtøkan hjá honum var bara hálva stigið ímóti Herlufi Hansen.

### Úrslit í gjár

**3. umfar**

| | |
|---|---|
| Carl Eli Nolsøe Samuelsen – Torkil Nielsen | 0-1 |
| Herluf Hansen – Martin Poulsen | ½-½ |
| Ólavur Simonsen – Olaf Berg | 0-1 |
| Finnbjørn Vang – IM Helgi Dam Ziska | 0-1 |
| Hans Kristian Simonsen – Rani Nolsøe | 1-0 |

**4. umfar**

| | |
|---|---|
| Torkil Nielsen – Rani Nolsøe ½-½ | |
| IM Helgi Dam Ziska – Hans Kristian Simonsen | ½-½ |
| Olaf Berg – Finnbjørn Vang | ½-½ |
| Martin Poulsen – Ólavur Simonsen | 0-1 |
| Carl Eli Nolsøe Samuelsen – Herluf Hansen | 1-0 |

**Støðan eftir 4 umfør**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1-2 | Nielsen Torkil | 2058 | Sandavágs Talvfelag | 3 |
| 1-2 | IM Ziska Helgi Dam | 2400 | Havnar Telvingarfelag | 3 |
| 3-5 | Samuelsen Carl Eli N. | 2231 | Vestmanna Talvfelag | 2½ |
| 3-5 | Simonsen Ólavur | 2092 | Klaksvíkar Talvfelag | 2½ |
| 3-5 | Simonsen Hans Kristian | 2178 | Kollafjarðar Talvfelag | 2½ |
| 6 | Berg Olaf | 2183 | Sandavágs Talvfelag | 2 |
| 7-8 | Vang Finnbjørn | 2081 | Klaksvíkar Talvfelag | 1½ |
| 7-8 | Poulsen Martin | 2303 | Havnar Telvingarfelag | 1½ |
| 9 | Hansen Herluf | 2023 | Havnar Telvingarelag | 1 |
| 10 | Nolsøe Rani | 2036 | Klaksvíkar Talvfelag | ½ |



*Helgi Dam Ziska kom nakað seinkaður ígongd i FM-kappingini í talvi. Saman við veteraninum, Torkil Nielsen, er hann á odda í FM-kappingini*

**5. umfar í dag kl. 14**

Herluf Hansen – Torkil Nielsen
Ólavur Simonsen – Carl Eli Nolsøe Samuelsen
Finnbjørn Vang – Martin Poulsen
Hans Kristian Simonsen – Olaf Berg
Rani Nolsøe – IM Helgi Dam Ziska

# Spurtaðu í Klaksvík

**Nýskipaða Klaksvík National 2008 gjørdist ein brakandi succés. Og fyrireikararnir sláa beinan vegin fast, at hetta verður aftur**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fram um aðrar kappingar, so varð alstórur dentur lagdur á, at kappingin skuldi verða so áskoðaravinarlig sum gjørligt.

Við innleiðandi umfari og eini finalu merkta av ljós- og dj-showi, innmarchi, setan, replay á stórskíggja og øðrum, skuldi rætta lagið fáast á áskoðararnar. Og hetta eydnaðist framúr væl. Ja, somikið væl, at tosið nú spakuliga er, um kappingin skal skipast sum ein International næsta ár.

Kappast varð í trimum aldursbólkum, har svimjararnir fyrst kappaðust um at røkka finaluni, sum varð svomin um kvøldið. Vinningarnir her vóru gávukekkar, umframt at heiðursmerki og steyp vórðu latin.

Ítróttarliga fevndi kappingin bert um teir fýra 50 metra-teinarnar hjá einstaklingum og liðum.

Seks svimjifeløg luttóku til kappingina, har Fuglafjarðar svimjifelag gjørdist suvereni vinnarin við heili 17 fyrsta plássum. Jóhann Heðinson gjørdi eitt ordans hál fyri fuglfirðingar, og einki er at ivast í, at hann hevur eina stóra framtíð. Hildur á Fløtti gjørdi eisini sín part fyri felagið og gjørdist hon, saman við Biritu Debes úr Flot, mest vinnandi svimjari hjá gentum.

Pauli Ø. Mohr, FS, hevur havt stóra framgongd í síni roynd eftir føroyska metinum í 50 m. frí. Á HS-stevnuni herfyri svam hann teinin uppá 24,08, og spenningurin var tí, um hann hesa ferð skuldi røkka metinum hjá Kristiani Olsen.

Sjálvur hevur Kristian ikki kappast síðani oyggjaleikirnar, men nú avbjóðarin stóð klárur, vildi hann ikki bakka. Og talan gjørdist um eina sera spennandi finalu, har báðir svimjararnir komu á mál í júst somu tíð.

**Heiðursmerkjabýtið**

| Felag | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Fuglafjarðar Svimjifelag | 17 | 10 | 9 |
| Havnar Svimjifelag | 4 | 5 | 3 |
| Ægir | 3 | 6 | 4 |
| Flot | 3 | 3 | 3 |
| Reki | 2 | 3 | 2 |
| Skeggjar | 0 | 0 | 1 |
| **Svimjari** | | | |
| Jóhann Heðinsson, FS | 3 | 1 | 0 |
| Birita Debes, Flot | 3 | 0 | 0 |
| Hildur á Fløtti, FS | 3 | 0 | 0 |
| Karina Petersen, FS | 2 | 1 | 1 |
| Pauli Ø Mohr, FS | 2 | 1 | 1 |
| Heðin L. Olsen, Reki | 2 | 1 | 0 |
| Magnus Jákupsson, HS | 2 | 1 | 0 |
| FS | 2 | 0 | 0 |
| Alvi Hjelm, Ægir | 1 | 3 | 0 |
| Poula Mohr, FS | 1 | 3 | 0 |
| Bjørg Seloy, HS | 1 | 1 | 1 |
| Kári J. á Høvdanum, FS | 1 | 1 | 1 |
| Monika Biskipstø, Ægir | 1 | 1 | 1 |
| David Simonsen, FS | 1 | 1 | 0 |
| Guðrun H. Jacobsen, HS | 1 | 1 | 0 |
| FS kvinnur b3 | 1 | 0 | 0 |
| FS kvinnur b4 | 1 | 0 | 0 |
| Kristian Olsen, Ægir | 1 | 0 | 0 |
| Turið S. Christiansen, Reki | 0 | 1 | 2 |
| Astrið Foldarskarð, Flot | 0 | 1 | 1 |
| Kristin S. Rasmussen, FS | 0 | 1 | 1 |
| Kjartan Petersen, Flot | 0 | 1 | 1 |
| Ægir b3 | 0 | 1 | 0 |
| Ægir b4 | 0 | 1 | 0 |
| Annika Petersen, FS | 0 | 1 | 0 |
| Flot b3 | 0 | 1 | 0 |
| Hjarnar Tórðarson, HS | 0 | 1 | 0 |
| Kristina Eliasen, HS | 0 | 1 | 0 |
| Reki Supergirls b3 | 0 | 1 | 0 |
| John Viljam Johannesen, Ægir | 0 | 0 | 3 |
| Jóhanna Egholm, FS | 0 | 0 | 2 |
| Hjørtur á Fløtti, FS | 0 | 0 | 1 |
| Jónfríð Hansen, FS | 0 | 0 | 1 |
| Kári Skála, HS | 0 | 0 | 1 |
| Kristian Joensen, Flot | 0 | 0 | 1 |
| Olavur S. Petersen, HS | 0 | 0 | 1 |
| Tróndur á Høvdanum, Skeggjar | 0 | 0 | 1 |
| Una Egholm, FS | 0 | 0 | 1 |